Mælir til a›al-verkfall

– Eitt uppskot, sum landsst‡ri› ætlar at leggja fyri tingi›, tekur verkfallsrættin frá fakfeløgunum, og tí má ta› ste›gast í fø›ingini sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbei›arafelag

LÓGARUPPSKOT OG FAKFELØG
Jan Müller

Kemur eitt uppskot um eina n‡ggja semingslóg, sum landsst‡ri› er vi› at leggja seinastu hond á fyri tingi›, so ver›ur av álvara ófri›ur á arbei›smarkna›inum. Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbei›arafelag er ovfarin og hevur næstan ikki or› fyri tí. Hon heldur uppskoti›, sum er fari› út til hoyring hjá fakfeløgunum er púra burturvi›. Ta› er so ví›gongt, at ta› tekur verkfallsrættin frá feløgunum og fer so langt, at semingsstovnurin kann í eini stø›u, har ta› skal atkvø›ast, avtaka eina innanh‡sis lóg hjá einum felag.

Sambært uppskotinum, sum Vinnumálast‡ri› hevur gjørt, kann ein semingsma›ur út í ta› óendaliga útskjóta svari› uppá eitt semingsuppskot. Tvs. at tú kanst bí›a í 3 mána›ir, seks osfr.

– Hetta kunnu fakfeløgini ikki gó›taka. Vit mugu fara so langt sum at leggja allar árar í sjógv fyri at ste›ga hesum uppskotinum. Og kemur uppskoti› í tingi› óbroytt, so má ta› ste›gast vi› einum a›alverkfalli sigur Ingeborg Vinther, sum inniliga heitir á øll fakfeløg í landinum um at ste›ga uppskotinum, á›renn ta› kemur í tingi›. Hon heldur ta› eisini vera sera botonkiligt, at ta› er ein fyrrverandi stjóri í Føroya Arbei›sgevarafelag, nú stjóri í Vinnumálast‡rinum, sum stendur fyri uppskotinum.

30 ár á sama virki

Lydia Dahl, vinstru megin, og Anna Maria Petersen fingu gávu frá O. C. Joensen á samkomu á Oyri í gjár

Mynd: Jens K. Vang

Í gjár, tann 1. desember vóru 30 ár li›in, sí›an virki› hjá O C Joensen á Oyri tók móti fyrstu skeljunum. Samstundis høvdu tvær av kvinnunum, sum vóru til arbei›is fyrsta dagin, 30 ára starvsdag

30 ÁRA STARVSDAGUR
Edvard Joensen

Oyri: Anna Maria Petersen og Lydia Dahl av Oyri høvdu í gjár 30 ára starvsdag á virkinum hjá O C Joensen. Tann 1. desember í 1970 vóru tær vi› til at taka móti fyrstu skeljunum, sum landa›ar vór›u til virki›, og tær arbei›a har enn.

Hendan dagin vór›u tær bá›ar saman vi› Súsonnu Andreasen av Oyri og Johan Poulsen av Oyrarbakka og tóku ímóti skeljunum, sum Poppy leg›i upp. Súsanna er nú komin so miki› til árs, at hon er givin at arbei›a, og Johan, ella Hanni, sum hann var› nevndur, ikki er okkara millum meira.
Lydia og Anna Maria minnast, grei›a tær frá, at tær stó›u vi› eitt træbor›, har ein takrenna var í mi›uni og reinsa›u skeljarnar, sum Hanni hev›i loypt í eini gassgr‡tu og lagt teimum á bor›i›. Tær loyptu skeljarnar komu heilar á bor›i›, og so skuldu tær opa tær og taka vøddan úr. Opingin var› gjørd vi› skei›, minnast tær bá›ar..

Reinsa›i vøddin var› koyrdur í takrennuna, me›an slógvi› fór í eina kurv á gólvinum. Lidna vøran var› so send a›rasta›ni at frysta.

Ikki vóru somu krøvini sett til arbei›sfólki› tá sum nú. Ikki stó›u tær og royktu yvir bor›inum kortini, men eingin seg›i naka› til, at tær fóru ein túr út um at fáa sær ein guv. Og vanligt var, at fólk stakk inn á gólvi› at práta, me›an arbeitt var›.

Nei, tá var einki flugunet fyri vindeyganum, og kantina var eingin. Poul á Oyri seldi kunsttø› og kraftfó›ur í handlinum, og ikki var óvanligt, at tær funnu sær ein kraftfóp›ursekk á lagrinum hjá Pouli, har tær settur seg vi› varmafløskuni, tá kaffití› var, minnast Lydia og Anna Maria, sum í gjár sótu hugnaliga í matarhøllini vi› kaffi, karamellum og jólabollum.

N‡ggj samheitaor›abók

Tú kann velja at ganga

ÚTGÁVA
Jústinus Leivsson Eidesgaard

Ella dreiva, fer›ast, flakka, mala, meyka, ranka, rankast, reika, rekast, reyla, sjórast, skóka, skókrast, slabba, slanka, slaknast, sleingjast, sleiva, slóma, slø›ast, snøklast, strella. streyla, svaga. sveima, vanna, vanka, vappa, vála vimsa ella bara ganga. Jú so nógv kann sigast um at ganga.

Samheitaor›abókin er komin og Henning Thomsen hevur lagt áhugavert verk úr hondum, sum forlagi› Sti›in hevur givi› út.

Í kvøld ver›ur áhugaverd kvøldseta í samband vi› at bókin er komin út. Hetta hendir klokkan 19:30. Tá ver›ur bókin framløgd, rø›ur hildnar, Hanus Johansen syngur og kaffi og køkur vera at fáa.

Føroyska máli› er væl lívga› seinastu árini vi› or›abókum. Nú ber sanniliga til at leita og samheitaor›abókin er kærkomin.

Nógv or› eru í okkara fyrstu synonymor›abók og øll eru ikki eins gó› í øllum førum. Men nú hevur tú møguleikan skjótt at finna or›, sum eru í ætt vi› hvør annan og munandi lættir um, tá ein skrivar vi› einum so hentum ambo›i á bor›inum.

Henning Thomsen vi› n‡ggju bókini

Tinganes er lukka› land

Løgma›ur sta›festir, at landsst‡ri› ikki ætlar at almannakunngera naka› meira um n‡ggja sjálvst‡risleistin, fyrr enn ein avtala er fingin í lag vi› danir

SJÁLVST†RIS-LEISTURIN
John Johannessen

Nógv samband hevur veri› millum løgmann og danska forsætisrá›harran um n‡ggja sjálvst‡risleistin, sum landsst‡ri› leg›i 2. november.

Men løgma›ur ætlar sær einki at siga um, hvat gongur fyri seg millum landsst‡ri› og donsku stjórnina fyrr enn partarnir eru komnir til eina avtalu.

Andstø›ulei›ararnir, Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard, kravdu á fundinum í uttanlandsnevndini í gjár at fáa meira at vita um samskifti› millum landsst‡ri› og donsku stjórnina. Men ta› fingu teir ikki.

Einki innlit

Fjølmi›larnir hava eisini roynt at fingi› innlit í hetta samskifti›. Men ta› hevur higartil ikki eydnast. Sosialurin sendi 14. november Løgmansskrivstovuni eina umsók um alment innlit í alt samskifti millum Løgmansskrivstovuna, danska forsætisrá›i› og a›rar myndugleikar sí›ani 26. oktober, tá fullveldissamrá›ingarnar slitna›u.

Svari› frá Løgmansskrivstovuni var stutt og greitt. Einki skjal fyriliggur í fullveldismálinum, sum er datera› eftir 26. oktober og sum er umfata› av lógini um alment innlit.

Løgma›ur váttar kortini, at hann hevur havt regluligt samband vi› danska forsætisrá›harran um n‡ggja sjálvst‡risleistin hjá landsst‡rinum.

Sambært grein 6 í lógini um innlit í fyrisitingina, hevur borgarin eisini krav uppá innlit í munnligt samskifti millum myndugleikar, sum hevur t‡dning fyri avger›ina í einum máli. Tískil kundi hugsast, at ta› skuldi bori› til at fingi› innlit í samskifti› millum løgmann og danska forsætisrá›harran. Men hetta ber kortini ikki til. Samrø›urnar millum Anfinn Kallsberg og Poul Nyrup Rasmussen eru ikki umfata›ar av lógini um alment innlit, er svari› úr Tinganesi.

Óformelt samskifti

Løgma›ur sigur endamáli› vi› samskiftinum vi› danska forsætisrá›harran vera at fáa í lag eina avtalu eftir n‡ggja leistinum, sum samgongan hevur sett sær fyri.

Men Anfinn Kallsberg vil kortini ikki kalla samskifti› vi› Poul Nyrup Rasmussen samrá›ingar.

– Talan kann ikki vera um samrá›ingar, uttan partarnir sita hvør sínu megin eitt samrá›ingarbor› vi› hvør sínum útspæli, sigur løgma›ur.

Vit spyrja so løgmann, um samskifi› vi› danska forsætisrá›harran sostatt kann kallast óformelt prát. Men ta› heldur løgma›ur als ikki.

– Talan er hvørki um samrá›ingar ella óformelt prát. Talan er um samskifti, sum hevur til endamáls at finna eina semju um n‡ggja leistin, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgma›ur skilir ikki, hví fjølmi›larnir hava so stóra trongd at fáa at vita nágreiniliga, hvat hann og danski forsætisrá›harrin tosa um. Hann vísir á, at máli› er á einum slíkum stø›i júst nú, at ta› ikki er egna› at ver›a brodera› og hongt út á ymsar hættir av fjølmi›lunum.

Tinganes er lukka› land, tá ta› sn‡r seg um at fáa uppl‡singar um n‡ggja sjálvst‡risleistin. Løgma›ur ger greitt, at einki kemur út, fyrr enn ein avtala fyriliggur

– At halda á at krevja innlit í samskifti› er ta› sama sum at krevja at sleppa at sita undir li›ini á mær, hvørja fer› eg tosi vi› Nyrup í telefonini, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgma›ur ger greitt, at tá ein avtala fyriliggur, skulu fjølmi›lar og onnur púra greitt fáa at vita, hvat avtalan inniheldur. Men einki kemur út á›renn ta›, ger løgma›ur greitt.

Nyrup skal vi› gera sjálvst‡rislógina

Jóannes Eidesgaard, fólkatingslimur, vil hava grei›i á, um danski forsætisrá›harrin hevur vraka› sjálvst‡rislógina hjá Javna›arflokkinum sum ein møguleika at loysa spurningin um ríkisrættarligu stø›-una

Magnus Dam
Keypmannahavn

Danski forsætisrá›harrin ver›ur nú noyddur til at taka stø›u til uppskoti› hjá Javna›arflokkinum um at lata eina sjálvst‡rislóg avloysa heimast‡rislógina. Jóannes Eidesgaard, fólkatingslimur, hevur reist máli› í Fólkatinginum í einum fyrispurningi til Poul Nyrup Rasmussen.

Jóannes Eidesgaard heldur, at ivi er sáddur um sjálvst‡rislógina eftir seinastu samrá›ingarnar millum stjórnina og landsst‡ri›, og hann vil nú hava grei›i á spurningunum, sum hava tiki› seg upp.

Í fyrispurninginum til danska forsætisrá›harran spyr Jóannes Eidesgaard, um sjálvst‡rislógin kann ver›a stø›i› undir n‡ggju ríkisrættarligu vi›urskiftunum millum Føroyar og Danmark.

Hann vil hava at vita, um stjórnin veruliga hevur sagt, at løgtingi› ikki kann fáa lóggevandi vald á øllum økjum innanfyri danska ríki›. Hann vísir á úttalilsi frá løgmanni um, at stjórnin hevur gjørt hesa ni›urstø›una á seinasta samrá›ingarfundi.

Anfinn Kallsberg hevur eftir seinasta samrá›ingarfund sagt, at ta› bara er eitt lóggevandi ting í danska ríkinum, og ta› er Fólkatingi›. Vi› ø›rum or›um eru heimildirnar hjá løgtinginum avmarka›ar og heimast‡rislógin bert ein delegatiónslóg, sum Fólkatingi› til eina og hvørja tí› kann taka aftur. Hesin spurningurin kann bert loysast, um Føroyar gerast ein suverenur statur, vil løgma›ur vera vi›.

Jóannes Eidesgaard vil hava at vita, um forsætisrá›harrin hevur somu stø›u sum løgma›ur, ella um ta› veruliga ber til at fáa fult ræ›i á øllum økjum innanfyri danska ríki›, solei›is sum Javna›arflokkurin hevur skoti› upp í sjálvst‡rislógini.

Jóannes Eidesgaard vísir eisini á úttalilsi frá Høgna Hoydal, sum eftir samrá›ingarnar hevur sta›fest, at sjálvst‡rislógin ikki letur seg gera í veruleikanum.

Danski forsætisrá›harrin hevur hinvegin fleiri fer›ir av fólkatingsins rø›arapalli sagt, at sjálvst‡rislógin er eitt skilagott alternativ, og at ta› ber til at seta lógina í verk, og spurningurin er, um Nyrup hevur broytt stø›u ella ikki.

Vi› sjálvst‡rislógini ver›ur sta›fest, at løgtingi› hevur fult ræ›i á øllum yvirtiknum málsøkjum, og hendan myndugleikan kann Fólkatingi› ikki taka aftur. Jóannes Eidesgaard vil hava forsætisrá›harran at svara uppá, um hetta veruliga letur seg gera. Fólkatingslimurin heldur ta› hava stóran t‡dning at fáa ivaspurningar beindar burtur, tí júst ta›, at løgtingi› hevur fult ræ›i á yvirtiknu málsøkjunum er kjarnin í uppskotinum um eina sjálvst‡rislóg.

Jóannes Eidesgaard spyr danska forsætisrá›harran, um møguleiki er fyri, at sjálvst‡risuppskoti› hjá Javna›arflokkinum kann loysa ríkisrættarliga spurningin

SOS KNÚKUR
Fokker Friendship í Mykinesi

Tað er ein øgilig sorlan, tá Fokker F27 fer gravandi niðan gjøgnum hagan. Mold og steinar fara sendandi í allar ættir, og buldrið av trykkluftsslangum doyvir næstan neyðarrópini inni í flogfarinum. Neyðhurðar bresta upp og splintrini av knústum rútum flúgva sum heglingur um oyruni á ferðafólkunum – teimum, sum ikki longu eru slongd út úr vrakinum. Bókin um flogvanlukkuna í Mykinesi í 1970 er komin í bókabúðirnar. Søgugongdin í bókini er bygd upp sum spenningssøga, men er í øllum lutum sambært frágreiðingum hjá teimum, sum vóru við flogfarinum, bæði ferðafólki og manning. Haraftrat eru samrøður gjørdar við bjargingarfólk, løgreglu, læknar, tyrluflogskipara og onnur. Einar 60 myndir eru í bókini.

Grækaris Djurhuus Magnussen